# EIN HÁLV MILLIÓ POLITISKAN HAP

**FC Barcelona biður fólk velja loysing. Ein kirkja verður brúkt til ein politiskan happening. 500.000 fólk taka lut á fólkaatkvøðum, sum ikki eru galdandi. Jú, í Catalonia er futtur í politikkinum, skrivar Sjúrður Skaale í hesi ferðafrásøgnini. Hann hevur verið í Catalonia sum útlendskur eygleiðari, og skrivað Sosialinum hesa ferðafrásøgn**

Sjúrður Skaale




*Ein av fyriskiparunum, Quim Arrufat, við eina valplakat í morgunsólini beint áðrenn valhølini lótu upp.*

Livandi tónleikur, fólkadansur í gøtunum, risastórar »paellas« og ókeypis vín til fólkið. Tað var rættiligur hátíðardámur í 220 bygdum og býum í Catalonia sunnudagin 25. apríl.

Orsøkin var, at fjórða umfar av eini óalmennari fólkaatkvøðu um eitt sjálvstøðugt Catalonia varð hildið henda dagin. 1,3 milliónir fólk – t.e. 20% av catalanska fólkinum – høvdu møguleika at atkvøða um, hvørt Catalonia skal skipast sum ein sjálvstøðug tjóð í ES.

### Frá »happening« til manifestatión

Hesar fólkaatkvøður byrjaðu sum ein »happening« í einari bygd 13. mai í fjør. Hetta tiltak fekk so nógva umrøðu, at 13. desember varð tað endurtikið í 167 bygdum. Síðani í 80 bygdum 28. februar í ár.

Og 25. apríl var so nógv tann størsta fólkaatkvøðan higartil. 218 bygdir og skuldu atkvøða, og tað var eisini fyrstu ferð, at tveir stórir býir – Girona og Lleida – tóku lut. Gongur eftir ætlan, verður tiltakið hildið í sjálvum stórbýnum Barcelona um eitt ár.

Hóast tær ikki eru almennar, og hóast tær ongar beinleiðis fylgjur fáa, eru fólkaatkvøðurnar fyriskipaðar júst sum um talan var um almennar, galdandi fólkaatkvøður. Øll, sum hava »valrætt«, verða skrásett í eini telduskipan, og sama skipan forðar fyri, at nakar kann atkvøða tvær ferðir.

Nógvir útlendskir eygleiðarar fylgdu eisini við valinum – og tað var orsøkin til, at eg var har.




*Í eini bygd bjóðaði tann lokali presturin kirkju sína fram sum valstað*

Og tað var ein bæði spennandi og áhugaverd uppgáva.

### 50 eygleiðarar

Umleið 50 eygleiðarar vóru við – allir úr tjóðum, sum ikki hava egnan stat.

Hetta vakti áhugan hjá miðlunum, og, sum eg ofta havi upplivað áður, var tað ikki minst Føroyar, teir vildu hoyra um. Tí hóast vit sjálv ikki geva okkum so nógv far um tað, so er tað, í eygunum á øðrum, næstan óskiljandi, at eitt so lítið land kann hava so nógv sjálvræði, sum vit hava.

At vit sjálv smíða flest allar av landsins lógum. At vit skulu góðkenna danskar lógir. At vit hava egna skattaskipan. At vit umsita egna undirgrund. At vit sjálv samráðast við onnur lond. Alt hetta er nærum ókent í Skotlandi, Catalonia, Baskalandi, Corsica og mongum øðrum ósjálvstøðugum londum, sum eru nógv, nógv størri enn Føroyar. Og tað vildu journalistar úr bæði útvarpi og sjónvarpi hoyra um.

### Barcelona-forsetin stuðlar

Eitt annað sum er øðrvísi, er tann skilnaður (ella tann formelli skilnaður), sum hjá okkum er millum politikk og onnur viðurskifti. Vit plaga t.d. at siga, at religión og ítróttur einki skulu hava við politikk at gera.

Soleiðis er ikki í Catalonia. Kirkjan hevur altíð — serliga í Franco-tíðini – havt ein týðandi politiskan leiklut. Og í eini av smærri bygdunum, har eg eygleiddi fólkaatkvøðuna, helt tann lokali presturin einki galið vera í at nýta ta lítlu, privatu kirkjuna sum valstað. Millum skriftstøðini á vegginum hekk ein plakat við áskrivini »Ja til sjálvræði«...

Og meðan eg koyrdi til næstu bygdina, hoyrdi eg í útvarpinum forsetan í FC Barcelona, Joan Laporta, inniliga mæla fólki til at fara á val, og atkvøða fyri einum sjálvstøðugum Catalonia.

FC Barcelona hevur undirheitið »Meira enn eitt fótbóltsfelag«. Tað sipar til, at felagið eisini umboðar catalanska samleikan. Gjøgnum øll árini, tá Franco var einaræðisharri í Spania, var FC Barcelona ein ímynd av teirri politisku mótstøðuni.

At endamálið hjá felagnum framvegis er annað og meira enn at vinna fótbóltsdystir, var áheitanin frá Joan Laporta eitt tekin um. FC Barcelona hevur, enn sum áður, eisini eitt politiskt endamál.

Uttan mun til hvat ein heldur um hetta, so má sigast, at tað er